Stórur vøkstur í pensjónini seinastu árini

- tøka føroyska pensjónin er nú omanfyri ta donsku
- takkað verið vøkstrinum í Samhaldsfasta og lægri skatti

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður

Hóast mangan verður sagt tað øvugta, so er veruleikin, at tøka føroyska pensjónin, tvs. aftaná skatt, stendur seg fullvæl móti tí donsku. Og nú frá 1.jan. 2008 fer hon eitt pettið upp um ta donsku.

Orsøkin til hetta er stóra hækkingin í Samhaldsfasta, sum hendir 1.jan. 2008, tá Samhaldsfasti fer upp við 370 kr. um mánaðin, úr 1860 til 2230 kr. um mán.

Samstundis er lógaruppskot til viðgerðar á løgtingi, sum hækkar viðbótina til ávísar pensjonistar, sum verður útgoldin 3 ferðir um árið, úr 5.556 kr. til 6924 kr. um árið.

Hóast donsku upphæddirnar eru hægri, so bera tær tó so høgan skatt, at nú er meira eftir til føroyska pensjonistin, enn tann danska, tá samanum kemur.

Føroyska viðbótin meira verd enn danski eldrakekkurin

Danski eldrakekkurin verður í hesi talvuni samanborin við føroysku viðbótina til ávísar pensjonistar. Tó er stórur munur á ! Danski eldrakekkurin er fult skattskyldugur og verður mótroknaður av aðrari inntøku longu frá 16.000 kr. um árið og er heilt burtur tá inntøkan kemur upp um 60.000 t. kr. Mótvegis hesum er føroyska viðbótin til ávísar pensjonistar ikki skattskyldug, og mótrokningin av aðraði inntøku byrjar ikki fyrr enn við 60.000 kr. fyri støk og 80.000 fyri hjún. Giftir pensjonistar fáa eina viðbót í felag.

Føroysku veitingarnar størri virði enn tær donsku

* danska ATP gagnar bert pensjonistum, ið hava veri arbeiðsaktiv og bert eftir arbeiðsavriki

* føroyski Samhaldsfasti fevnir um allar borgar sum hava fylt 67, og allir fáa somu fullu upphædd

* danski eldrakekkurin er fult skattskyldugur og verður mótroknaður longu frá 16.000 kr og er burtur við 60.000 kr.

* føroyska viðbótin til ávísar pensjonistar er ikki skattskyldug og verður ikki mótroknað av aðrari inntøku fyrr enn frá 60.000 fyri støk og 80.000 fyri hjún.

Stór hækking í pensjónini 2004 til 2008

Tøka pensjónin – við Samhaldsfasta í Føroyum og ATP í Danmark, fyri 2008
- mánaðarliga, uttan aðra murandi inntøku enn pensjónina

	Danmark	Føroyar	Munur
Stakur pensjonistur			
Grundupphædd	5.088	4.199	
Viðbót	5.122	2.975	
ATP*	1.656		
Samhaldsfasti		2.230	
Ældrechek	651		
Viðbót til ávísar pensjonistar		577	
- Tils. áðrenn skatt	12.516	9.949	-2.567
- Aftaná skatt	**8.939**	**9.186**	**247**
Hjún, bæði pensjonistar			
Grundupphædd	10.176	9.623	
Viðbót	4.784	4.609	
ATP*	3.311		
Samhaldsfasti		4.460	
Ældrechek	1.302		
Viðbót til ávísar pensjonistar		577	
- Tils. áðrenn skatt	19.573	16.269	-3.305
- Aftaná skatt	**14.538**	**15.120**	**584**

*) [illegible] Danmarks Statistik.

Stór hækking í pensjónini 2004 til 2008
Tá henda samgongan tók við, varð gjørt av at leggja stóran dent á at styrkja Samhaldsfasta, so at útgjaldið kundi hækka munandi. Í talvuni og myndini niðanfyri sæst hvussu stór henda hækkingin er – ikki er neyðugt at siga meir um tað, tí tað framgongur skilliga av bæði talvu og stabbamynd.

Pensjónsupphæddir mánaðarliga	1/1 2004	1/1 2008	Hækking 04-08 í kr.	Hækking 04-08 í %
Grundarupphædd - stakur pensjónistur	4.169	4.169	0	0 %
Pensjónsviðbót - stakur pensjónistur	2.544	2.976	432	15 %
Grundarupphædd - giftir pensjónistar	3.313	3.313	0	0 %
Pensjónsviðbót - giftir pensjónistar	1.969	2.304	335	15 %
Samhaldsfasti	697	2230	1.533	220 %
Stakur, Grundupph. + Viðbót + Samhaldsfasti	**7.410**	**9.375**	**1.965**	**21 %**
Gift, bæði, Grundupph. + Viðbót + Samhaldsfasti	**11.958**	**15.693**	**3.735**	**25 %**

Tá henda samgongan tók við, varð gjørt av at leggja stóran dent á at styrkja Samhaldsfasta, so at útgjaldið kundi hækka munandi. Í talvuni og myndini niðanfyri sæst hvussu stór henda hækkingin er – ikki er neyðugt at siga meir um tað, tí tað framgongur skilliga av bæði talvu og stabbamynd.

Framhaldandi menning av Samhaldsfasta

Bæði løgtingsins Trivnaðarnevnd og Fíggjarnevnd hava víst á, at neyðugt er við ávísum broytingum í Samhaldsfasta sum ein partur av føroysku almannapensjónini, sambært ásetingunum í norðurlendsku konventiónini um almannatrygd. Hetta snýr seg í høvuðsheitum um, at føroyingur, sum flytir í onnur norðanlond, hevur rætt til at fáa sín part av Samhaldsfasta við sær, alt eftir hvussu longi hann hevur búð her í landinum. Og øvugt, at ein tilflytari úr øðrum norðanlondum bert hevur rætt til tann lutfalsliga partin av Samhaldsfasta, ið svarar til tey ár hann hevur búð her, áðrenn hann gerst 67 ár. Hetta er serliga neyðugt at gera, segði Fíggjarnevndin í áliti t. 28.11.06, "tá útgjaldið nú gerst ein týðandi partur av tí almennu pensjónsskipanini".







Gjald fyri valgreinar

Frá mánadegnum 29. oktober at rokna fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar - bæði í sambandi við fólkatingsvalið 13. november og løgtingsvalið, sum verður í seinasta lagi 19. januar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 90 oyru fyri millimeturin - tó 1,25 kr fyri fríggjadagsblaðið. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til løgtingsvalið.

Blaðstjórin

Jóannes og vinfólk vitja í Betesda



Leygarkvøldið kl. 19:30 fáa øll tey, ið dáma væl at lurta eftir góðum sangi og tónleiki, ein serstakan møguleika til hetta.

Tá fáa norðoyingar nevniliga vitjan av Jóannesi S. Hansen og eini 10 øðrum tónleikahugaðum fólki, sum hetta kvøldið fara at spæla og syngja saman og saman við áhoyrarunum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at hetta tiltakið verður fyriskipað. Jóanes og vinfólk hansara hava áður vitjað millum annað á Viðareiði og á Glyvrum. Óhugsandi er ikki, at tey fara at vitja onnur støð eisini.

Talan verður um góðar og kendar sangir, ið verða sungnir í samkomum kring landið, og sum hesaferð verða frambornir við einum hópi av ymiskum ljóðførum: flygil, keyboard, violin, harmoniku og ymiskum sløgum av guittarum.

Aftaná sangløtuna verður ein drekkamunnur á skránni, har gott høvi verður at fáa eitt prát við onnur fólk.

Hugsandi er, at nógvir norðoyingar fara til tiltakið, men at eisini fólk úr øllum landinum leggja sær leiðina til Betesda hetta kvøldið.

sb.